ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

8. juni 2021
Mál: 21/07811-2
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Heri Petersen

Nr. 52-154/2020

Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Pensjónistar á arbeiðsmarknaðinum

Spurningar:

1. Fer landsstýrismaðurin at gera tað møguligt hjá øllum fólkapensjónistum, ið eru á arbeiðsmarknaðinum, at fáa rætt til dagpening vegna sjúku?
2. Fer landsstýrismaðurin at hækka markið fyri mótrokning í fólkapensjónini, ið samgongan lækkaði úr 60.000 kr. niður á 45.000 kr?
3. Fer landsstýrismaðurin at broyta aldursmarkið fyri skipanina við tillagaðum starvi, so tað fer at bera til at arbeiða í tillagaðum starvi, eftir at viðkomandi er vorðin 67 ár?

Viðmerkingar:

Búskaparráðið hevur lagt frágreiðing fram, ið staðfestir, at stórt starvsfólkatrot er og verður innan almanna-, heilsu- og eldraøkið komandi árini. Fyri at megna hesa avbjóðing verður brúk fyri øllum hondum, ið megna, á arbeiðsmarknaðinum komandi mongu árini. Tað er ein stórur fyrimunur fyri samfelagið, at eisini tey, ið eru farin um pensjónsaldur, eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, ynskja tey tað. Tí er alneyðugt, at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum eru skipað soleiðis, at tey eggja fólki at halda fram á arbeiðsmarknaðinum eftir pensjónsaldur.

Herfyri boðaði landsstýrismaðurin frá, at tey við útsettari pensjón skulu fáa atgongd til dagpening vegna sjúku. Hetta er bert ein elalítil partur av teimum, ið eru fólkapensjónistar, og tí kann tað undra, at ikki verður skipað soleiðis fyri, at allir pensjónistar, ið eru á arbeiðsmarknaðinum, fáa dagpening vegna sjúku.

Sitandi samgonga lækkaði markið fyri mótrokning í fólkapensjónini úr 60.000 kr. niður í 40.000 kr. At mótrokningarfría upphæddin er so lág, ger tað ikki eggjandi hjá pensjónistum at arbeiða og rakar tey, ið hava eina lítla uppsparing, lutfalsliga hart.

Í dag mugu fólk, ið eru í tillagaðum starvi, fara av arbeiðsmarknaðinum, tá ið tey gerast pensjónistar. Eitt amboð, ið vildi gjørt tað møguligt hjá hesum bólki at hildið fram á arbeiðsmarknaðinum, hevði verið at avtikið ella hækkað aldursmarkið fyri, nær henda skipan heldur uppat.

Á Løgtingi, 27. mai 2021

Eyðgunn Samuelsen

Svar:

1. *Fer landsstýrismaðurin at gera tað møguligt hjá øllum fólkapensjónistum, ið eru á arbeiðsmarknaðinum, at fáa rætt til dagpening vegna sjúku?*

   Sambært upprunaligu dagpengalógini frá 1999 høvdu fólkapensjonistar rætt til dagpening vegna sjúku. Fólkapensjonistar høvdu tó einans rætt til dagpening í 20 vikur í einum ári, í mun til 40 vikur hjá persónum, sum ikki vóru pensjonistar. Ein lógarbroyting í 2010 hevði við sær, at fólkapensjonistar síðani tá ikki hava havt rætt til dagpening vegna sjúku.

   Í viðmerkingunum til hendan spurningin verður vist á, at tað bert er ein elalítil partur av fólkapensjonistum, sum við ætlaðu broytingunum fara at fáa atgongd dagpening vegna sjúku. Tað er rætt, at tað einans er ein lítil partur av samlaða talinum av fólkapensjonistum. Men meginparturin av fólkapensjonistum eru ikki á arbeiðsmarknaðinum og eru sostatt ikki fyri inntøkumissi í sambandi við sjúku. Nógvir fólkapensjonistar hava bara leyst tilknýti til arbeiðsmarknaðin, og hesi fáa hægri fólkapensjón og hava sostatt eitt inntøkugrundarlag, hóast arbeiðsinntøkan dettur burtur. Ein stórur partur av fólkapensjonistum, sum hava fast tilknýti til arbeiðsmarknaðin, velja at útseta fólkapensjónina, og hesi fara ætlandi at fáa atgongd til dagpening vegna sjúku. Umleið 20 prosent av øllum nýggjum fólkapensjonistum velja at útseta pensjónina.

   Tá ein fólkapensjonistur velur at útseta pensjónina, er tað tí, at arbeiðsinntøkan saman við møguligari privatari pensjónsuppsparing er somikið høg, at fólkapensjónin er fult mótroknað ella tætt uppá at vera fult mótroknað. Fólkapensjonistar, sum útseta pensjónina, fáa onga fólkapensjón, og tá sjúka rakar, kann sostatt ein týðandi partur av inntøkuni detta burtur.

   Hjá fólkapensjonisti, sum ikki hevur so høga arbeiðsinntøku, lønar tað seg vanliga ikki at útseta pensjónina. Tá arbeiðsinntøkan ikki er høg, tá hevur fólkapensjonisturin rætt til fólkapensjón ella lutvísa fólkapensjón. Tað merkir, at ein fólkapensjonistur, sum arbeiðir nakað, hevur fólkapensjónina at dúva uppá, um hann gerst sjúkur.

   Júst fólkapensjonistar, sum arbeiða, hava undir hesi samgonguni fingið bøttar fíggjarligar umstøður, m.a. tí mótrokning í sambandi við aðra inntøku er gjørd munandi lagaligari. Hetta merkir, at fólkapensjonistur, sum arbeiðir, hevur nú eitt størri fíggjarligt frælsi at leggja sær lívið til rættis, og eisini varðveitir pensjonisturin størri part av síni pensjón, hóast arbeiðsinntøku.

   Ein fólkapensjonistur, sum hevur arbeiðsinntøku á t.d. 20.000 kr. um mánaðin, hevur millum 6.000 og 8.500 kr. meira eftir um mánaðin aftaná skatt enn persónur, sum arbeiðir fulla tíð fyri vanliga tímaløn (upphæddin, sum viðkomandi hevur meira eftir, er treytað av hjúnastøðu og treytað av, um viðkomandi fær gamla ella nýggja pensjón).

Upphæddin, sum verður veitt í fólkapensjón, er treytað av aðrari inntøku. Tá inntøkuviðurskifti broytast, t.d. tá arbeiðsinntøka dettur burtur, tá hevur fólkapensjonisturin rætt til hægri fólkapensjón. Hetta verður gjørt við, at Almannaverkið ásetir pensjón av nýggjum við støði í mettari ársinntøku. Er talan um stutttíðarsjúku er neyvan grundarlag fyri at áseta pensjón av nýggjum, tí pensjónsupphæddin broytist lítið. Men er talan um longurvarandi sjúku, kann pensjónsupphæddin hækka lutfalsliga nógv, um pensjónin verður ásett av nýggjum.

Í viðmerkingunum til spurningin verður víst á, at starvsfólkatrot verður innan almanna-, heilsu- og eldraøkið komandi árini, og at tað hevur stóran týdning, at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum eru skipað soleiðis, at tey eggja fólki at halda fram á arbeiðsmarknaðinum, eftir at tey eru farin um pensjónsaldur. Landsstýrismaðurin skal í hesum sambandi gera vart við, at partar av teimum, sum arbeiða innan almanna-, heilsu- og eldraøkið, og sum arbeiða í minsta lagi 20 tímar um vikuna, vanliga hevur rætt til løn undir sjúku – eisini hóast tey eru farin um pensjónsaldur. Hesi verða tí ikki beinleiðis fevnd av einum rætti til dagpening vegna sjúku.

Tey, sum bara arbeiða fáar tímar, ella bara arbeiða av og á, hava ikki høga arbeiðsinntøku, og tí hava tey rætt til hægri fólkapensjón. Hesi hava tí eina hægri inntøku at liva av, um tey gerast sjúk (umframt, at tey kunnu áseta pensjónina av nýggjum, um sjúkan gerst longurvarandi).

Hyggja vit frameftir fara øll, ið móttaka fólkapensjón, og sum hava havt tilknýti til arbeiðsmarknaðin, at hava eina ávísa pensjónsuppsparing, sum verður útgoldin sum lívrenta og ratupensjón. Fólkapensjonistar fara tí at hava eitt lutfalsliga trygt fíggjarligt grundarlag – eisini fólkapensjonisturin á arbeiðsmarknaðinum, sum gerst sjúkur.


2. *Fer landsstýrismaðurin at hækka markið fyri mótrokning í fólkapensjónini, ið samgongan lækkaði úr 60.000 kr. niður á 45.000 kr?*

Eitt tað fyrsta, sum hendan samgongan framdi í verki, var at betra munandi um viðurskiftini hjá fólkapensjonistum á arbeiðsmarknaðinum. Samlaðu broytingarnar í løgtingsmáli nr. 10/2019 og 11/2019 vóru til fyrimuns fyri allar fólkapensjonistar, tí grundupphæddin hækkaði og fólkapensjonistar fingu rætt til ein serligan frádrátt í skattinum. Hóast markið fyri mótrokning varð broytt úr 60.000 kr. niður til 45.000 kr. (og ikki 40.000 kr., sum spyrjarin skrivar í viðmerkingunum til spurningin), er tað nú meira lokkandi at arbeiða sum fólkapensjonistur, enn tað var fyri bara tveimum árum síðani.

At tað ikki loysir seg at arbeiða, aftaná at inntøkan hevur rokkið markið á 45.000 kr. tykist vera ein fatan, sum nógvir pensjonistar hava. Men í veruleikanum lønar tað seg altíð hjá fólkapensjonistum at arbeiða, og pensjonisturin fær altíð úrtøku burturúr eini eyka vakt.

Myndin niðanfyri vísir sambandið millum arbeiðsinntøku og inntøku aftaná skatt og øll tvungin gjøld. Fyri hvørja krónu arbeiðsinntøkan hækkar, hækkar eisini tøka inntøkan (inntøka eftir skatt og øll tvungin gjøld). Myndin vísir, at tað er ein munur á hallinum á linjuni hjá ávikavist fólkapensjonisti og hjá løntakara, sum ikki er pensjonistur, men hallið er hóast alt avmarkað.

Inntøka eftir skatt og tvungin gjøld



At fólkapensjonistar uppliva, at tað ikki lønar seg at arbeiða, kann hava skattatekniskar orsakir. T.d. heilsutrygdargjald og kringvarpsgjald verður trekt av tí, sum verður flutt fyrst, og um lønin kemur áðrenn pensjónin, tá sær tað út sum um, at skatturin á løn er óvanliga høgur. Men skatturin og gjøldini javna seg út, og tá mánaðurin ella árið er farið afturum, tá hevur fólkapensjonisturin altíð fingið meira burturúr at arbeiða.

Tá sokallaða pensjónsnýskipanin hjá undanfarnu samgongu varð send til ummælis, varð skotið upp, at markið fyri mótrokning skuldi lækka til 30.000 kr. Í endaliga uppskotinum, sum varð sent Løgtinginum (lm. nr. 65/2017), varð markið hækkað til 45.000 kr. Løgtingið broytti markið til 60.000 kr.

Ein fólkapensjonistur á arbeiðsmarknaðinum hevur munandi hægri inntøku enn starvsfelagin, sum ikki er fólkapensjonistur. Talvan niðanfyri vísir inntøku eftir skatt og gjøld hjá fólkapensjonistum á arbeiðsmarknaðinum.

Útgoldið eftir skatt og øll tvungin gjøld til fólkapensjonist við arbeiðsinntøku

	Ógiftur		*Giftur*	
Arbeiðsinnt.	gomul pensjón	Nýggj pensjón	gomul pensjón	Nýggj pensjón
5.000 kr./mdr.	15.600	15.500	13.900	13.850
10.000 kr./mdr.	17.500	17.600	16.150	16.000
15.000 kr./mdr.	19.900	19.600	18.600	18.000
20.000 kr./mdr.	22.250	21.300	21.100	20.000
*22.200 kr./mdr.**	23.200	22.300	22.050	20.650

**Viðm.: 22.200 kr. um mánaðin svarar umleið til løn fyri fulla tíð sambært sáttmála millum Føroya arbeiðsgevarafelag og Føroya arbeiðarafelag*

Aftrat upphæddunum omanfyri er møguligt útgjald frá privatari pensjón, og útgjald sambært eftirlønarlógini. Tað skal nevnast, at uppspard eftirløn, sum verður útgoldin sum lívrenta ella lutapensjón sambært almannapensjónslógini verður roknað sum inntøka og harvið mótroknað í fólkapensjónini.

Fyri at seta upphæddirnar í talvuni omanfyri í ein samanhang er í talvuni niðanfyri dømi um, hvat ein løntakari, sum ikki er pensjonistur, fær útgoldið aftaná skatt og gjøld.

Útgoldið eftir skatt og øll tvungin gjøld til løntakara (ikki-pensjonistur)

Arbeiðsløn	
22.200 kr./mdr. (arbeiðsmannaløn)	13.900
25.000 kr./mdr.	15.400
30.000 kr./mdr.	17.950

Talvurnar omanfyri vísa, at fólkapensjonistar á arbeiðsmarknaðinum hava góðar treytir. Ein fólkapensjonistur, sum t.d. arbeiðir fulla tíð sum ófaklært arbeiðsfólk, hevur umleið 6.750 til 9.300 kr. meira eftir um mánaðin aftaná skatt og gjøld, enn starvsfelagin, sum hevur somu arbeiðsløn men ikki er fólkapensjonistur (munurin er treytaður av, um pensjonisturin er giftur ella ógiftur og treytaður av, um tað er gomul ella nýggj pensjón). Samanberingin tekur ikki hædd fyri, at pensjonisturin fær útgoldna privata pensjón ella fær sáttmálaásett eftirlønargjald aftrat arbeiðsinntøkuni.

Broytingin hevði alt annað líka havt við sær, at fólkapensjonistar við arbeiðsinntøku hægri enn 60.000 kr., høvdu fingið 250 kr. meira útgoldið um mánaðin. Hetta eru fólkapensjonistar, sum frammanundan hava góðar inntøkur. Fólkapensjonistar við inntøku millum 45.000 og 60.000 kr. høvdu fingið frá 0 og upp til 250 kr. meira útgoldið um mánaðin, meðan broytingin ikki hevði ávirkað inntøkuna hjá teimum, sum hava arbeiðsinntøku lægri enn 45.000 kr. um árið.

At hækka markið fyri mótrokning úr 45.000 kr. upp til 60.000 kr. hevur lítlan og ongan týdning fyri insitamentið hjá fólkapensjonistum at arbeiða. Tað er bara hjá fólkapensjonistum við árligari inntøku millum 45.000 og 60.000 kr. um árið, at broytingin hevði havt marginalan týdning. Hjá øllum øðrum fólkapensjonistum verður effektivi marginalskatturin óbroyttur.

Tað merkir, at tá ein fólkapensjonistur við árligari inntøku hægri enn 60.000 kr. skal taka støðu til, um hann ynskir at arbeiða meira, tá hevur broyting í markinum úr 45 upp til 60.000 kr. ongan týdning fyri meirinntøkuna. Tað er bara hjá teimum fólkapensjonistum, sum ikki ynskja at blíva mótroknaðir yvirhøvur, og sum tí halda seg undir markinum, sum møguliga høvdu arbeitt eitt vet meira.

Dømi um ein fólkapensjonist, har arbeiðsinntøkan hækkar úr 45.000 kr. um árið upp til 60.000 kr.
Verandi skipan: Inntøkan eftir skatt og øll gjøld hækkar úr 14.927 kr. um mánaðin upp til 15.472 kr.
Við broyttum markið fyri mótrokning (úr 45 upp til 60.000 kr.): Inntøkan eftir skatt og øll gjøld hækkar úr 14.927 kr. um mánaðin upp til 15.722 kr.

Sum dømi omanfyri vísir, hevur broytta markið avmarkaðan týdning fyri, hvat fólkapensjonistur við ársinntøku millum 45 og 60.000 kr. fær meira burturúr við at arbeiða meira. Fyri inntøku hægri enn 60.000 kr. hevur ein broyting ongan týdning fyri, hvat fólkapensjonisturin fær meira burturúr. Broytingin gevur hesum 250 kr. meira útgoldið um mánaðin uttan mun til, um viðkomandi arbeiðir meira, ella um viðkomandi hevur óbroytta inntøku.

At hækka markið fyri mótrokning úr 45.000 kr. upp til 60.000 kr. hevur við sær, at leysliga mett 1500-2000 fólkapensjonistar fara at fáa meira um í pensjón, harav tey flestu fara at fáa 250 kr. meira um mánaðin. Tað hevur við sær eina meirútreiðslu fyri landskassan á umleið 4,5 til 6 mió. kr. um árið. Og hetta eru fólkapensjonistar, sum frammanundan hava lutfalsliga høga inntøku.

3. *Fer landsstýrismaðurin at broyta aldursmarkið fyri skipanina við tillagaðum starvi, so tað fer at bera til at arbeiða í tillagaðum starvi, eftir at viðkomandi er vorðin 67 ár?*

Ein persónur í tillagaðum starvi er starvsettur á einum arbeiðsplássi eftir vanligum treytum. Tað merkir, at arbeiðsgevarin rindar løn fyri tað, sum persónurin í tillagaðum starvi leggur eftir seg á arbeiðsplássinum. Arbeiðsgevarin rindar arbeiðslønina, og harumframt fær borgarin eitt lønarískoyti frá Almannaverkinum. Tá ein persónur í tillagaðum starvi fyllir 67 ár, missir hann rættin til lønarískoyti. Men persónurin kann halda fram at arbeiða, sum hann gjørdi frammanundan, og í staðin fyri lønarískoyti fær hann rætt til fólkapensjón, útgjald frá Samhaldsfasta, umframt at hann fær serligar skattafyrimunir.

Ein persónur í tillagaðum starvi, sum heldur fram at arbeiða á sama hátt, eftir at hann er blivin fólkapensjonistur, fær í flestu førum hægri inntøku, hóast lønarískoytið dettur burtur.

	Tillagað starv			**Fólkapensjonistur**	
Løn frá arbeiðsgevara	Lønar-ískoyti	Inntøka áðrenn skatt	**Inntøka eftir skatt og gjøld**	Ógiftur	Giftur
5.000	17.652	22.652	**14.154**	15.722	13.826
10.000	16.152	26.152	**16.034**	17.848	16.005
15.000	14.652	29.652	**17.807**	19.777	17.943
20.000	12.152	32.152	**19.025**	21.549	19.777

Fyrivarni skal takast fyri, at lønarískoyti hjá persóni í tillagaðum starvi kann vera lægri enn í talvuni omanfyri, tí arbeiðsløn og lønarískoyti kann ikki vera hægri enn sáttmálaløn. Harumframt er ikki hædd tikin fyri, at fólkapensjonistur fær útgoldið privata pensjón, og hædd er ikki tikin fyri, at sáttmálaásett eftirlønargjald verður útgoldið saman við lønini.

Talvan vísir sostatt, at ein ógiftur fólkapensjonistur, sum hevur verið í tillagaðum starvi, altíð fær hægri inntøku, meðan ein giftur fólkapensjonistur varðveitir umleið somu inntøku, um viðkomandi heldur fram at arbeiða sum vanligt.

Landsstýrismaðurin hevur ætlanir um, at fólkapensjonistur við útsettari pensjón skal hava rætt til dagpening vegna sjúku. Arbeiðsmarknaðarrættindi annars hjá fólkapensjonistum fara at halda fram óbroytt.